

Nú eru allir fýra slóðbrótandi nýbygningarnir hjá Thor komnir undan. Her ein av teimum, Thor Magni.

# Thor fær fjórða nýbygningin handaðan

**Jan Müller**

30.09.2015 - 16:31

Oljan.fo

Kl. 11 í morgun bleiv M/V Thor Freyja handað Thor reiðarínum á Besiktas skipasmiðjuni í Turkalandi. Eitt hátíðarhald við umboðum fyri reiðaríið og innbodnum varð hildið, har alt gekk uppá stás.

M/V Thor Freyja er nummar fýra í røðini av fýra nýbygningum hjá felagnum, sum eru serútgjørdir til fleirtáttaðar tænastur fyri seismikskip. Skipini verða øll flokkaði í hægsta umhvørvis- og ísklassa, nevnt: Clean Design, Recyclable og Ice-1A og eru 64,4 metrar til longdar og 2089 BT til støddar.

Nýbygningarnir hjá Thor setir felagið í ein klassa fyri seg innan seismikk support vinnuna og ruddar slóð fyri nýggjum tænastumøguleikum hjá felagnum.

Tað var Súsanna Kelduberg, sum doypti skipið. Súsanna er kona ein av eigarunum av Thor, Hans Andrias Kelduberg.

Thor hevur langtíðar sáttmálar við PGS og Thor Freyja fer beint í arbeiði sigur P/F Thor í tíðindaskrivi